# … Føroya fyrsti sexleikuhandil




*– Um tú hevur livað í einum parlagi í 25-30 ár, hví so ikki royna okkurt nýtt? Tað eru eisini nógvar kvinnur, ið hava orgasmutrupulleikar, og her kunnu sexleiku vera ein hjálp*

av hesum slagnum, heldur Halla Sif Elvarsdóttir ikki, at tað hevði loyst seg við einum veruligum sexleikuhandli í Føroyum. Einum handli í einum handilshølum, har kundin kom inn og hugdi at teimum ymsu dildo'unum, ymsu sløgunum av glíðikrem ella følskum ginunum, ið lógu á hillunum.

– Eg rokni ikki við, at ein handil hevði riggað í Føroyum. Tað er samfelagið ov lítið til. Og eg skilji væl fólk, sum ikki tíma í ein tílíkan handil, sigur Halla Sif Elvarsdóttir.

## Útseldar gummi-ginur

Fólk vitja tó heimasíðuna, og fólk bíleggja higani. Men hvat er tað, ið kundarnir keypa. Eru tað nakrar leiku, ið fólk altíð spyrja eftir og bíleggja?

– Kynsøsandi droparnir frá Purity Herbs selja altíð væl. Cock-ringarnir eru eisini altíð væl umtóktir (Sí mynd aðrastaðni á síðuni, blðm.) og so eisini glíðikrem sjálvandi, sigur Halla Sif Elvarsdóttir.

– Vibratorarnir vórðu útseldir beinanvegin. Men tað er so øgiliga skiftandi við teimum, og beint nú eru teir "yt", fortelur Halla Sif Elvarsdóttir.

Sølan hjá fyrsta føroyska sexleikuhandlinum gongur væl. Vibratorar selja kanska ikki eins væl í løtuni, sum at byrja við, men í staðin eru tað onnur ting, ið selja væl beint nú. Serliga er tað "fleygarin", sum tey rópa tað, ið hevur selt væl í januarmánaði.

"Fleygarin" er ein følsk gina. Ein gina úr gummi til mannfólk, sum er væl móttikin millum mannligu kundarnar hjá daman. fo.

– Eg bílegði 45 fyrst í januar. Tær eru allar seldar, so nú má eg bíleggja fleiri, greiðir Halla Sif Elvarsdóttir frá. "Klitoris-kitlarin" hevur eisini selt væl. Tað er eitt sexleika, sum sær út sum ein varrastift, men í veruleikanum er ein pinkalítil dildo við vibrator.



*Hetta eru Cock-ringar, ið hava vibrator. Sum navnið sigur, er talan um ringar at seta um murtin hjá mannin, og hesir skulu eitast at vera til gleði til báðar partar*

## Yvirhøvur væl móttikið

Hóast hon hevur skelkað fleiri við síni sølu, heldur Halla Sif Elvarsdóttir, at fólk yvirhøvur hava tikið tað væl upp, at hon umvegis alnetið selur sexleiku.

Halla Sif Elvarsdóttir dylur tó á ongan hátt yvir, at hetta var høvuðssamtaluevnið í Miðvági, um tað mundi hon byrjaði virksemi.

– Reaktiónirnar hava verið blandaðar, og sjálvandi hevði eg helst eisini flent, um nábúgvi mín brádliga fór undir sovorðið. Men eg haldi, at fólk yvirhøvur hava tikið tað væl upp.

Halla Sif Elvarsdóttir sær tó ikki søluna av sexleikum sum ein framtíðar vinnuveg. Tað er nakað hon tekst við beint nú, við síðuna av gerandis arbeiði hennara.

## Ristandi gjøgnum tollin

Men hví skulu fólk yvirhøvur keypa sexleiku, spyrji eg Hallu Sif Elvarsdóttir at enda?

– Hví ikki? Um tú hevur verið í einum parlagi í 25-30 ár, hví so ikki royna okkurt nýtt? Tað eru eisini nógvar kvinnur, ið hava orgasmutrupulleikar, og her kunnu sexleiku vera ein hjálp, vísir Halla Sif Elvarsdóttir á.

Hon førir síðani fram, at tað er eingin, sum leggur merki til tín, um tú bíleggur á síðuni. Vørurnar verða sendar í einum diskretum pakka, sum líkist øllum øðrum pakkum, sum vit fáa sendandi.

Og flennandi heldur hon fyri, at nú slepst eisini undan, at føroyskar kvinnur og menn koma ristandi gjøgnum tollin eftir ferðir uttanlands, í berum ótta fyri at verða steðgað við sexleiku í viðførinum.



*Falska ginan er "best-seljarin" í januarmánaði*

Sosialurin